# Listir

**Leygardagin verður móttøka í einum øðrvísi nýggjum handli í Havnini. Talan er um handilin »Listir«, har fimm kvinnur selja ymiska list, sum tær sjálvar hava virkað**

LISTIR
*eydna@sosialurin.fo*

– Tað hendir jú ógvuliga lítið á handvirkisøkinum í Føroyum, hvat í sølu viðvíkur. Vit hava Gluggaglæmu og Hendur og Hugflog nakrar dagar um árið, og har koma fólk kanska serliga fyri at hyggja. Ofta gloyma tey at keypa. Tí hava vit gjørt av at lata »Listir« upp, so vit hava ein møguleika at selja tað, vit gera, greiðir ein av eigarunum, Àrna Helmsdal frá.

Hon sigur, at tær allar hava kenst í eina tíð, og at tær allar hava gingið og smáhugsað um at lata ein tílíkan handil upp, har tær kunnu selja egna list. Nú hava tær so sligið seg saman.

– Vit meta at hetta er júst rætta tíðin og rætta staðið at lata ein tílíkan handil upp. Tí slógu vit til. Tað er eisini ein stórur fyrimunur at arbeiða saman, tí tað ger úrvalið breiðari og handilin meiri livandi, sigur Árna.

Tær hava allar arbeiði við síðuna av, og fara tí at skiftast um at vera í handlinum hvønn gerandisdag frá kl 13 og leygardag frá kl 9. Fyrsti dagur verður um, men sum fólk als ikki vita nakað um. Teimum ætla vit at bjóða framat, greiðir Árna frá.

Hon sigur, at »Listir« bert selir serligar og øðrvísi unika–vørur, og at tað er slíkum vørum, tær sóknast eftir hjá gestasýnarum.

– Fyrstu gestasýnararnir verða Glarlist av Eiði, Elin Lindenskov, sum plantulitar tógv og ger sápu, og Arndis Lindberg og Marita Guttesen, sum virka ymiska heilt serliga klædnavøru. Vit ætla ikki at hava siðbundu føroysku mynstrini og pløggini í okkara handli, tí tað er líkasum økið hjá Heimavirkinum, og tað ætla vit okkum ikki inn á, greiðir Àrna frá.

Fyribils hava tær leigað handilshølini Bøgøtu í eitt hálvt ár.

– Vit vita einki um tørv ella áhuga hjá fólki at keypa slíka vøru. Vit hoyra tað ofta, at okkurt tílíkt manglar í Havnini, men vit vita allíkavæl ikki, um fólk vilja brúka pengar uppá hetta, tá alt kemur til alt. Nú fara vit so at seta fingurin á pulsin í eitt hálvt ár, og so fáa vit at síggja hvat hendir víðari, sigur Árna Helmsdal at enda.

### Gestasýnarar

Eitt, sum kanska er serligt við »Listir«, er, at teir fimm eigararnir eisini fara at loyva gestasýnarum inn í nýggju hølini.

– Vit ætla at hava útskifting í úrvalinum, og tí fara vit at loyva ymiskum gestasýnarum at vera hjá okkum í styttri ella longri tíðarskeið. Tað eru jú so ómetaliga nógv fólk, sum gera ótrúliga flotta og serliga vøru runt um í krókunum, men sum fólk als ikki vita nakað um.




*Tær fimm kvinnurnar, sum mánadagin lata upp handilin »Listir«. Tær hava leingi sóknast eftir einum staði at selja sína heimavirkaðu vøru, og hava nú avgjørt at lata upp egnan handil, fyribils í eitt hálvt ár*

*Mynd Jens Kr. Vang*

## LISTIR ER:

**Jóna Dalsgarð og Guðrið í Stórustovu**
Gera barnaklæðir út bumull, høri, vaskaðum líni og fleece. Gera eisini hondbundin pløgg til børn.

**Elspa Petersen**
Ger eksperimenterandi klædnapløgg í frískum litum. T.d. sjal, turrikløð, húgvur, taskur og troyggjur. Nýtir ymiskt serligt at pynta við, alt frá perlum til frímerki.

**Hildur Hermansen**
Ger ymiska vøru úr keramikk. Koppar, kannir, snapsagløs og skálir í modernaðum sniði. Øll vøran er serstøk og drejað við hond. Nýtir alternativar hættir at lita vøruna, m.a. øsku.

**Árna Helmsdal**
Bindir og tøvir í meturvøru, sniðgevur og seymar síðani ymisk pløgg. Hevur higartil arbeitt í náturlitum, men er nú farin at nýta sterkar litir eisini. Virkar t.d. troyggjur og niðurdeilir.

**Eys**

# Petra ætlanir um at gevast

**Kendi bólkurin Petra vitjar í Føroyum í næstum og øll tekin eru um, at hetta verður teirra síðsta konsert í Europa og ein tann síðsta yvirhøvur**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kendi bólkurin Petra hevur konsert í Føroyum tann 19. apríl og hetta verður eftir øllum at døma ein av teirra síðstu konsertum.

Bólkurin hevur ætlanir um at gevast. Konsertin í Føroyum verður sostatt tann síðsta í Europa og síðani fer Petra á ferð í USA og síðani er ætlanin at gevast.

Tað eru keldur nær bólkinum, ið siga, at hetta er tað, ið mennirnir í Petra nú práta um og hava ætlanir um.

### Átoppinum

Símun J. Hansen er ein av fyrireikarunum til føroysku konsertina við Petra. Mikukvøldið var hann til konsert við Petra í Kolding.

- Hetta var ein hin besta konsertin, eg havi verið til og so avgjørt tann besta við Petra og eg havi verið til 5 konsertir við teimum, sigur Símun og leggur afturat, at teir ikki gevast, tí tað gongst teimum illa, men heldur er talan um bólk, ið gevst á toppinum.

Og í práti við fyristøðumannin hjá Petra fekk Símun tíðindini um, at bólkurin ætlar at gevast, eftir Føroyaferðina og ferðina í USA.

Petra hevur ætlanir um at geva allar sínar 20 útgávur út í sonevndum boks setti og síðani at fara á endaliga ferð í USA seinni í ár.

Og so er eftir øllum at døma liðugt. Síðsta konsert teirra í Europa verður sostatt í Fuglafirði tann 19. apríl. Og tá teir síðani hava vitjað USA, er ikki meira.

# Suðuroyar Sparikassi og VB-Sumba skrivað sáttmála

**Suðuroyar Sparikassi og VB-Sumba hava skrivað sponsorsáttmála, ið fevnir um fremstu liðini hjá felagnum**

STUÐUL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Vígdis Nolsøe, Vb-Sumba, og Per Jacobsen, Suðuroyar Sparikassi, skriva undir sáttmála, meðan umboð fyri liðini í bestu deildunum hjá felagnum eisini eru til staðar*
*(Mynd: D. Olsen)*

Suðuroyar Sparikassi er høvuðsstuðul hjá VB-Sumba. Mikukvøldið skrivaðu partarnir undir sáttmála, ið fevnir um fremstu liðini hjá felagnum, nevniliga 1. deild hjá monnum í fótbólti og 1. deild hjá kvinnum í hondbólti. Sáttmálin er galdandi frá 1/1-2005 og til 31/12-2005.

Suðuroyar Sparikassi hevur verið stuðul hjá VB í mong ár og hildið verður nú fram við VB-Sumba. Líka síðani 1972 hevur Suðuroyar Sparikassi verið stuðul hjá VB og var VB eisini fyrsta lið í Føroyum yvirhøvur, ið hevði sponsormerki á troyggjunum. Øll árini hevur Suuroyar Sparikassi verið stuðul, eitt ár undantikið og var tað síðst í áttatiárunum.

Suðuroyar Sparikassi stuðlar dúgliga lokalt og á ítróttarøkinum kann nevnast, at stovnurin eisini stuðlar kapproðrarbátinum Smyrli.